## TILTØK

**Missiónshúsið við Landavegin**
Í kvøld kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum og kl. 18 Møti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Tóra Slættalíð. Evnið: Memorera Guds Orð.
Fríggjadagin kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Tummas Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

**Ebenezer**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti, kl. 20 Kvinnumøti. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar John í Skemmuni um evnið: »Fría frelsan«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir. www.livdin.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa við Morten Person, prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til 18. Serliga vilja við biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Tú ert vælkomin at koma við bønarevnum skrivliga, ið verða løgd framman fyri tað Heilaga Sakramenti. »Verið her og vakið við mær, vakið og biðið«.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Evnið: Frá myrkri til ljós 1. partur. Talari: Sam Jakobsen, kl. 11.50 Barnaguðstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Frits Thomsen, evnið: Hvússu blívi eg frelstur?
Fríggjadagin kl. 19.30-21 Juniorhugni.
**25. jan. til 1. feb. er Missiónsvika:**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli/Familjumøti, Barnakórið í Libanon í Sørvági syngur. Kl. 18 Møti við Tom Skaale, Streingjakórið í Sørvági syngur.
Mánadagin kl. 20 Møti við Bergur D. Joensen, Kristiliga Sangkórið syngur.
Týsdagin kl. 20 Møti við Jóhs. M. Olsen. Argjakórið syngur.
Mikudagin kl. 20 Møti við Alfred Petersen, Meinigheitskórið syngur.

**Samkoman Rhema**
Mikukvøldi kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið verður onki JC Teens.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, kl. 17.30 Títtlingar, kl. 18.30 Barnarøddir venja, kl. 19 Mennirnir samlast.
Hósdag kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.
Vikuskiftismøtir við vitjan frá Suðuroy verða fríggjakvøldið kl. 20, leygarkvøldið kl. 20 og sunnudag kl. 11 og 18.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Bíbiltími við Ingu Poulsen Dam, presti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Í kvøld verður frítíðararbeiði kl. 19.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Missiónsvikan heldur fram í kvøld hóskvøldið kl. 20.00 við Jógvan Fríðrikson.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Vegna missiónsviku í Sandavági, kemur sjómanskvinnuringurin **ikki saman hósdagin 22. januar, men** verður fluttur til hósdagin 29. januar somu tíð.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
**Missiónsvika verður frá mikukvøldinum 21. januar til sunnudagin 25. januar.**
Hóskvøldið kl. 20 Møti við Niels Jacob Nielsen, trúb. Ung úr Hvalvík/Streymnesi syngja, eisini luttaka menn úr Kollafirði við sangi.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við Frits Thomsen, Skála. Ung av Skála syngja, kl. 22 Ungdómsløta við ungdómi av Skála.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Margeir Toftegaard, Fuglafjørð. Taborkórið syngur. Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta v/ altarg., Mogens T. Christensen, prestur, kl. 15 Familjumøti við luttøku úr Sørvági, kl. 18 Møti við Martin R. Jacobsen, presti og Mariu Fugløø. Thomas Dam og Petur Hansen syngja. Innsavnan til H.M.
Hálvan tíma áðrenn hvørt møti verður bønarløta.
Drekkamuður verður hvørt kvøld.

**Tjørnuvík**
Leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 15 verða serstøk møti í bygdarhúsinum. Fyriskiparar eru: Elbjørg Johannesen, Klaksvík, Hildigarð Jacobsen og Haldis Lisberg, Tvøroyri, Eyðun Christiansen, Vágur, Signheðin og Monza Olsen, Tvøroyri og Svenning av Lofti, Tórshavn. Hesi hava øll røtur sínar í Tjørnuvík.

**Keldan, Skálafirði**
Sunnudagin kl. 17 Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Missiónsvika í Leirvík**
Hósdagin kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20 Møti við Sylverius Jacobsen, Skáli, Glyvrakórið syngur.
Fríggjadagin kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20 Møti við Niels Jacob Nielsen, Strendur, Sangkreftir úr Leirvík syngja. Innsavnan til Heimamissiónina.

**KFUM og K, Klaksvík**
Mikudagin kl. 20 Bíblutími. Evnið: Jóhannes kap. 13-14 við Charlottu Thorsteinson.
Hósdagin kl. 20.30 Gospelkórið »Gleði venur«.
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Hanus Lassen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kristoffur Olsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti við André Matras.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna missiónsvikuna í Húsavík.

**Betania, Skopun**
Í kvøld kl. 19 koma tey ungu saman.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld kl. 20 Streingjakórvenjing.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 19. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur
kl. 10.15-12 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
***Týsdagur 20. januar***
kl. 10-11.30 Sangur. Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14.30 Málprát. Jóhan H. W. Poulsen
***Mikudagur 21. januar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 15 Túrur (sjá skránna í bløðunum)
kl. 17-21 Opið hús
***Hósdagur 22. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
***Fríggjadagur 23. januar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilmeld. mánadag tlf. 316491

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn**
*Tinghúsvegur 18*
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Felagið Tórshavn – Gongutúrur**
Sunnudagin 25. januar verður gongutúrur: Vatnbrunnurin í Villingadali og Fransatoftir. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Lættur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 19. januar***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Drekkamuður
***Týsdagin 20. januar***
Drekkamuður.
Ítriv fyri áhugað.
***Mikudagin 21. januar***
Drekkamuður.
Prát og sangur
***Hósdagin 22. januar***
Hugnaløta – drekkamuður Maria Jacobsen hugleiðir um Fløvan
***Fríggjadagin 23. januar***
Opið hús. Kaffi, te og pannukøkur

*Gjørt verður vart við, at væl ber til at nýta Eysturoyarleiðina til Fløvan. Um spurningar eru, eru tit vælkomin at ringja 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

## GULLBRÚDLEYP

Fríggjadagin 30. januar hava hjúnini Nelly og Petur Olsen (Piddi), Saltangará. verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Svangaskarði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá helst áðrenn sunnudagin 25. januar á tlf. 448793 ella 226095.

## BRÚDLEYP

12. juni giftast Hallgerð Poulsen og Brian Bjartalid. Vígslan verður kl. 13.00 í Kristnastovu, Birmavej 36, 2300 København S. Tey, sum ynskja at gleða okkum við at koma, biðjast vinarliga ringja á tlf. 0045 21912901 eftir kl. 18 innan 1. mai 2004. Veitslan verður kl. 18 á Moltkes Palæ, Dronningenstværgade 2.

# Bilar

Nr. 14 • hósdagur • 22. januar 2004 • 78. árg.



*Baklyktirnar sita høgt sum á fleiri av nýggju Ford modellunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ford Focus C-Max 1,6:

## Nýggjur væl koyrandi Ford MPV

**Ford eru nú komnir á marknaðin við einum 5-persóna MAV/MPV í miðalklassanum. Ford Focus C-Max er bygdur yvir sama plattform sum nýggi Focus persónbilurin, ið kemur seinni í ár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Ford koma nú á marknaðin við Focus C-Max við fimm sitiplássum og stórum viðførisrúmi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leingi er tað, ið væl skal verða. Endiliga komu Ford á marknaðin við einum MAV/MPV í miðalklassanum. Ford Focus C-Max er bygdur yvir sama plattform sum komandi Ford Focus. Tað hevur annars ljóðað, at bilurin skuldi koma við sjey sitiplássum, men soleiðis varð ikki. Ford hava nevniliga gjørt fleiri marknaðarkanningar og sett ymiskar spurningar fram, sum t.d. um kundarnir veruliga ynska sær meira enn fimm sitipláss. Tey flestu søgdu, at tey aftastu sitiplássini blivu næstan ongantíð brúkt, men tey kundu heldur hugsað sær størri viðførisrúm. Út frá hesum kanningum gjørdu teir so av at gera ein rúmligan MAV og ikki ein MPV, við fimm sitiplássum og stórum viðførisrúmi.

### Liðilig innrætting

Bilurin er ergonomiskur og liðiliga innrættaður, soleiðis at baksetrini sum eru deild í tvey kunnu flytast aftur og fram óbundin av hvørjum øðrum. Rygglenið í miðjuni kann leggjast fram yvir og brúkast sum borð. Á stólarygginum á forsetrinum eru eisini flúgvaraborð. Við at flyta baksetrini ella taka tey heilt úr bilinum kann støddin á viðførisrúminum broytast eftir egnum ynski.

Fleiri ymiskir motorar eru at velja í millum sum t.d. 1,6 litur bensinmotorur við 100 hk, 1,8 litur við 120 hk, og 2,0 litur við 145 hk. Dieselmotorar við common-rail innspræning eru eisini á skánni, sum t.d. 1,6 TDCi við 110 hk og 2,0 TDCi við 136 hk.

Koyrieginleikarnir á Focus C-Max er á ongan hátt merktir av, at bilurin er ein MAV. Tað vil siga, at hóast hann er hægri enn ein vanligur persónbilur, er hann eins stúttur og ein persónbilur at koyra. Undirvognurin er tann sami sum á nýggja Focus persónblinum, sum kemur á marknaðin seinni í ár.

### Opið hús í vikuskiftinum

Í samband við nýggja Focus C-Max hevur P/F Wenzel opið hús komandi leygardag og sunnudag, har høvið verður at síggja ella royna bilin. Leygardagin er opið frá kl. 10.00 til kl. 16.00 og sunnudagin frá kl. 13.00 til kl. 16.00. Kaffi og køkur, og sodavatn o.a. verður at fáa. Eisini verður møguleiki at vinna ein eldrivnan modelbil av slagnum Street Ka. Væl egnaður til børn í 3 - 5 ára aldri.

### Ford Focus C-Max 1,6 Ambiente

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,6 litur 4 syl. 100 hk |
| 0-100 km/t: | 12,9 sek |
| Bensinnýtsla: | 14,5 km/l |
| Dekkstødd: | 195/65-15 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd: | 433,0 cm |
| Breidd: | 183,0 cm |
| Hædd: | 160,0 cm |
| Eginvekt | : 1200 kg |
| Viðførisrúm: | 460 - 1620 litrar |
| Prísur: | kr. 217.000,- |
| Søluumboð: | P/F Wenzel<br>Akranesgøta<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 354500<br>www.wenzel.fo |


*Ford Focus C-Max innan. Girstongin situr væl fyri undir instrumentborðinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*


*Rygglenið í miðjuni kann eisini brúkast sum borð*
*Myndir: Jens Kristian Vang*